# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 30.04.2018 kl. 20:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir:: Jóhan Christiansen
Hanna Jensen
Brandur Jacobsen
Árni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Tollakur Joensen
Hans Mourits Foldbo
Gudny Langgaard
Uni Rasmussen

Vara limir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari: Erik Lervig


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 26/18 | 18/00177-1 | 18/00177 - Val av varalimi til nevndina fyri Báta- og listasavnið í Leirvík | 3 |
| 27/18 | 18/00167-1 | Tilmæli til - Broyting í byggisamtyktini – Økir broytt til sethúsaøkir B2 í Syðru-, Norðragøtu og Leirvík. | 4 |
| 28/18 | 18/00131-3 | Tilmæli til mál 18/00131 - Eykajáttan mars 2018 | 5 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 29/18 | 14/00367-9 | Mál nr. 14/00367 frágreiðing og tilmæli | 7 |
| 30/18 | 13/00070-31 | Mál 13/00070 Dagføring av bátahylinum í Norðragøtu. Málslýsing og tilmæli | 9 |
| 31/18 | 18/00178-2 | 18/00178 - Avtala um tekniska ráðgeving viðv. nýggjum dagstovni við Gøtugjógv | 12 |
| 32/18 | 18/00170-2 | Val av ráðgevandi bólki viðv. nýggjum demensheimi | 13 |
| | | | |

## 26/18 18/00177 - Val av varalimi til nevndina fyri Báta- og listasavnið í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | | | 18/00177-1 |
| 2 Býráðið | 30.04.2018 | 26/18 | 18/00177-1 |

| Málslýsing: |
|---|
| Tað sita 5 fólk í nevndini í Báta- og listasavninum. Eysturkommuna velur 3 av hesum limum, og umboðini eru Fríðgerð Heinesen, Fríði B. Nielsen og Hanna Jensen. Eingin varalimur er valdur. |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| |

| Tilmæli |
|---|
| |

**Viðtøka Býráðið 30. april 2018**
Einmælt samtykt at velja Hans Mourits Foldbo sum varalim fyri kommununa

## 27/18 Tilmæli til - Broyting í byggisamtyktini – Økir broytt til sethúsaøkir B2 í Syðru-, Norðragøtu og Leirvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevd | 23.04.2018 | 20/18 | 18/00167-1 |
| 2 Býráðið | 30.04.2018 | 27/18 | 18/00167-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Vísandi til mál nr. 17/00227 í samband við dagføring av býar- og byggisamtyktini fyri Eysturkommunu, við atliti at keypa jørð í Leirvík og Norðragøtu, hevur umsitingin gjørt eitt uppskot at broyta býarætlanina í Syðrugøtu, Norðragøtu og Leirvík.<br><br>Her verður víst til uppskot til Býarætlan fyri Eysturkommunu dagfest. 18.04.18.<br><br>Økini verða broytt frá øki J: Landbúnaðarøki til B2: Bústaðarøki við serstakari byggisamtykt. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Fíggjarligu avleiðingar eru mettar til 20.000 kr., tað fevnir um broyting í tekningum og kostnaður til Umhvørvisstovuna. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at broyta byggisamtyktina. |

### Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevd 23. april 2018
Byggi - og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

### Viðtøka Býráðið 30. april 2018
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

# 28/18 Tilmæli til mál 18/00131 - Eykajáttan mars 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 26.03.2018 | 25/18 | 18/00131-3 |
| 2 Býráðið | 03.04.2018 | 25/18 | 18/00131-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 24.04.2018 | 36/18 | 18/00131-3 |
| 4 Býráðið | 30.04.2018 | 28/18 | 18/00131-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til hjál. yvirlit yvir játtanir frá 2017 at flyta til 2018.<br><br>Talan er um játtanir sum eru samtyktar í 2017, og har arbeiðið er byrja ella umbiðið í 2017, men sum ikki verður liðugt fyrrenn í 2018. Íalt eru tað 3,5 mió. kr. sum skulu flytast frá 2017 til 2018, hetta er bert íløgujáttanir.<br><br>Á seinast býráðsfundi tann 26. februar, bleiv samtykt at veita eykajáttan til at stuðla verkætlanini TROM við 125 t.kr., og á sama fundi bleiv samtykt at veita Skúlaspíranum eykajáttan til lønir. Fyri fíggjarárið 2018 verður hetta 120 t.kr. Hesar báðar eykajáttaninar eru rakstrarjáttanir. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Íløgurnar vaksa við 3,5 mió. kr., men tá hetta eru játtanir sum vóru játtaðar í 2017, og tiknar við tá, men ikki vóru framdar, ávirkar hetta ikki gjaldføri hjá kommununi.<br><br>Eykajáttaninar til skúlaspíran og Trom viðføra at rakstrarútreiðslurnar í 2018 vaksa við íalt 245 t.kr, og tað ávirkar gjaldføri tilsvarandi.<br><br>Samlaða úrslitið (RLÚ) lækkar við 3,75 mió. kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at veita eykajáttanir sum víst á omanfyri á íalt 3,75 mió. kr. Gjaldføri hjá kommununi er gott og mælt verður til at peningurin verður tikin av innistandandi. |

## Viðtøka Fíggjarnevnd 26. marts 2018

Fíggjarnevndin mælit til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## Viðtøka Býráðið 03. april 2018

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## Viðtøka Fíggjarnevnd 24. april 2018

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. Viðgerð.

## Viðtøka Býráðið 30. april 2018

Einmælt samtykt at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð

## 29/18 Mál nr. 14/00367 frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevd | 20.04.2016 | 17/16 | 14/00367-9 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.04.2016 | 22/16 | 14/00367-9 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevd | 23.04.2018 | 14/18 | 14/00367-9 |
| 4 Fíggjarnevnd | 24.04.2018 | 35/18 | 14/00367-9 |
| 5 Býráðið | 30.04.2018 | 29/18 | 14/00367-9 |

**Málslýsing:**

Arbeiðið at gera kloakkarbeiði á Stallagøtu og Tróndargøtu í Norðragøtu, bleiv boðið út 26.02.2018.
Lisitatión var hildin 02.04.2018, og inn komu 3 tilboð, tey vóru hesi:

| Bjóðandi | Tilboðsupphædd u/MVG | Fyrivarni |
|---|---|---|
| Verkon | Kr. 1.953.500,00 | - |
| JHR Entreprenørar | Kr. 2.985.379,57 | - |
| Heildarverk | Kr. 3.160.779,50 | - |
| | | |

PB Consult, ráðgevandi verkfrøðingar hevur prosjektera verkætlanina, gjørt eina kostnaðarmeting og sett upp innkomin tilboð.

Metingin fyri arbeiðið var 2.000.000,00 kr.

PB Consult hevur gjøgnumgingið innkomin tilboð, og skriva eitt tilmæli til Eysturkommunu.

PB Consult mælir til at taka av tilboð hjá Verkon, sum er áljóðandi á 1.953.500,00 kr. u/MVG

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Tilboðið er 1.953.500,00 kr. Man kann vænta áleið 10 % kemur afturat, so verður tað tilsamans 2.148.850,00 kr. hetta er uttan MVG.

Játtanin, sum er sett av fyri 2018, røkkur til hesa arbeiðstøku.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at fylgja tilmælinum hjá PB Consult at taka av tilboð hjá Verkon, sum er áljóðandi á 1.953.500,00 kr. u/MVG

**<u>Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevd 23. april 2018</u>**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Viðtøka Fíggjarnevnd 24. april 2018</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**<u>Viðtøka Býráðið 30. april 2018</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndin.

## 30/18 Mál 13/00070 Dagføring av bátahylinum í Norðragøtu. Málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 11.09.2017 | 22/17 | 13/00070-31 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevd | 15.09.2017 | 46/17 | 13/00070-31 |
| 3 Fíggjarnevnd | 20.09.2017 | 46/17 | 13/00070-31 |
| 4 Býráðið | 25.09.2017 | 69/17 | 13/00070-31 |
| 5 Vinnunevndin | 12.03.2018 | 8/18 | 13/00070-31 |
| 6 Vinnunevndin | 16.04.2018 | 11/18 | 13/00070-31 |
| 7 Fíggjarnevnd | 24.04.2018 | 28/18 | 13/00070-31 |
| 8 Býráðið | 30.04.2018 | 30/18 | 13/00070-31 |

**Málslýsing:**

Í samb. við dagføring av bátahylinum í Norðragøtu, mæltu Vinnunevndin og Byggi- og býarksipanarnevndin m.a. til at gera neyvari kanningar, evt. simuleringar,av súginum í bátahylinum, verða gjørdar skjótast gjørligt.

Umsitingin hevur kanna hvørjir møguleikar eru á økinum, og í samráð við Landsbyggifelagið, hava vit fingið ein vegleiðandi kostnaðarmeting frá DHI (Dansk Hydraulisk Institut).

Kanningin inniber fylgjandi:
Nummerisk kanning nr. 0, 1, 2, 3, 4 og 5 og uppskot til víðkan av bátahylinum vm.:

0) Verandi havn, støðan í dag.
1) Verandi bátahylur, innsigling smælkað frá 20 niðurí 10m.
2) Grótpierur fluttur 30m vestureftir, innsigling 10 m breið.
3) Grótpierur fluttur 30m vestureftir og í syðra betongpierin, innsigling 10m gjøgnum betongpierin.
4) Brimgarður úr vestara landinum á 135m, innsigling í havnina 95m breið.
5) Brimgarður úr vestara landinum á 170m, innsigling í havnina 70m breið.
6) Eykakanning fyri høga aldu

Vegleiðandi kostnaðurin fyri hesa kanningina er 248.000 kr. Siga vit frá áðrenn 18. september 2017, kann DHI geva okkum úrslitið av kanningini síðst í oktober 2017.

**8. mars 2018:**

Aldukanningin frá DHI er innkomin nú. Og her vístu kanningarnar í høvuðsheitum, at bestu úrslitini er at gera brimgarð á vestursíðuni (uml. frá Filadelfia). Hetta verður ein dýr íløga tí tað er niður í uml. 20 metur dýpi.

Aldukanningin vísti eisini, at dømi 6 og 7 eru tær bestu loysnirnar, um vit hyggja burtur frá loysnini við nýggjum brimgarði.
Dømi 6 er tá verðandi løbið í bátahylinum verður smalka niður á 5 metrar, og áleið 8 metrar av innaru síðuni á grótpirinum verða flutt útum grótpirin.
Dømi 7 er tá nýtt løb verður gjørt á betong pirin, og áleið 8 metrar av innaru síðuni av grótpirinum verða flutt útum grótpirin.

Dømi 7 vísir seg at verða eitt vet kyrrari enn dømi 6, og samstundis verður tað eitt lítið vet kyrrari í syðra hylinum. Undirstrikast skal, at tað ikki er stórur munur á dømi 6 og 7.

**14. apríl**
Umsitintingin hevur biðið Teknistovuna gjørt tekningar út frá viðtøkunum á seinasta fundi í Vinnunevndini.
Innkomnar tekningar frá Teknistovuni eru nú komnar til viðgerðar. Harumframt hevur Teknistovan gjørt kostnaðarmeting av dømunum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

LBF hevur sent kommununi kostnaðarmeting av at gera dømi 6 og 7. Felags fyri báðar kostnaðarnetingarnar er, at ókendar útreiðslur er sett til 20% av samlaða kostnaðinum. Hetta er høgt sett, grundað á at bæði grótpirurin og betongpirurin eru gamlar installatiónir.
Dømi 6 er mett at kosta 1.310.000 kr. u/mvg
Dømi 7 er mett at kosta 1.470.000 kr. u/mvg

**18. apríl 2018**
Sambært kostnaðarmeting dagfest 18.04.18 verður samlaði kostnaðurin uml. 8 mió. kr. deild yvir 3 byggistig.

**Tilmæli**

Mælt verður til at veita eykajáttan til kanningararbeiðið í ár, við atliti til at fáa alt málið fyri í fíggjarætlanini í komandi ár.
------------------------
**8. Mars 2018**
3 mió er settar av til íløgur í Gøtu havn 2018. Vit hava fingið eina aldukanning og eina kostnaðarmeting. Dømi 7 vísir seg at vera tann besta loysnin, bæði fyri norðara og syðra hylin, og tískil verður mælt til at biðja um tilboð, samsvarandi dømi 7, og arbeiða víðari við hesum.

**14. apríl 2018**
Mælt verður til at bátarnir venda við stevninum inneftir

## Viðtøka Vinnunevndin 11. september 2017
Vinnunevndin mælir til at veita eina eykajáttan til eykaarbeiðið.
Vinnunevndin mælir samstundis til at gera eina simulering av grótpirinum, har tilfarið á innaru síðu verður flutt beint út um pirin, fyri at rætta pirin upp. Kannast skal tá poirinurin er beinur sum er ella við einum knekki, sum peikar beint út um norðara kaienda.

## Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevd 15. september 2017
Mæla til at fylgja tilmælinum hjá Vinnunevndini og veita eykajáttan í ár.

## Viðtøka Fíggjarnevnd 20. september 2017

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Viðtøka Býráðið 25. september 2017**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Viðtøka Vinnunevndin 12. marts 2018**
Vinnunevndin mælir til uppskot 6, og við støðið í hesum uppskoti verður endalig verkætlan gjørd um hvussu bátahylurin skal skipast (tal av bátum, dýpið til m/b Brynhild, hvønn veg bátar skulu liggja, slag av bátabrúgvum/fingrum og festi, ljós og trivnaðarøki).

**Viðtøka Vinnunevndin 16. april 2018**
Vinnunevndin mælir framhaldandi at taka støðið í dømi nummar 6 í aldukanningini. Vinnunevndin mælir somuleiðis til at nýta uppskot nr. 5 frá Teknistovuni, dagfest 16. apríl 2018, við hesum tillagingunum:

- Løbið verður max 7,5m breitt
- býta arbeiðið í 2 byggistig: Byggistig 1) Alt - undantikið brúnna til Brynhild, dráttur, fríðkan av økinum omanfyri (busslummið niðanfyri Blásastovu, sí tekning), og evt. træbrúgv framvið grótpirinum

**Viðtøka Fíggjarnevnd 24. april 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**Viðtøka Býráðið 30. april 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini tann 16. apríl 2018 og fíggjarnevndini 24. apríl 2018, tó verður løbið 10 m, við møguleika at smalka tað aftur.

## 31/18 18/00178 - Avtala um tekniska ráðgeving viðv. nýggjum dagstovni við Gøtugjógv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.04.2018 | 31/18 | 18/00178-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til hjál. uppskot um avtalu um tekniska ráðgeving viðv. nýggjum dagstovni við Gøtugjógv |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Viðtøka Býráðið 30. april 2018**
Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi uppskot til avtalu, við tí broytinging at byggileiðslan verður tekniska umsiting hjá kommununi ella annar óheftur aktørur.

## 32/18 Val av ráðgevandi bólki viðv. nýggjum demensheimi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.04.2018 | 32/18 | 18/00170-2 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 30.04.2018 | 7/18 | 18/00170-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til hjál. fundarfrágreiðing frá stýrisfundi í Nánd. Stýrið hevur samtykt at velja ein ráðgevandi bólki ið skal lýsa týðandi viðurskiftir í sambandi við ætlaninar at byggja nýtt demensheim. Stýrið hevur eisini samtykt at tá tað er Eysturkommuna sum er byggiharri er tað Eysturkommuna sum setir ráðgevandi bólkin. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Viðtøka Trivnaðarnevndin 30. apríl 2018**
Mæla til at seta ein ráðgevandi bólk, ið skal lýsa týðandi viðurskiftir í sambandi við ætlanirnar at byggja nýtt demensheim.
Mæla til, at bólkurin verður mannaður fylgjandi:
Eitt umboð fyri trivnaðarumsiting, eitt fyri teknisku umsiting, leiðslan í Nánd, eitt starvsfólkaumboð fyri demensdeildina í Gøtubrá og tvey politisk umboð.

**Viðtøka Býráðið 30. april 2018**
Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini. Eisini samtykt at politisku umboðini verða Hans Mourits Foldbo og Hjalti Dalheim

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Hanna Jensen, Gudny Langgaard, Árni Jacobsen, Hans Mourits Foldbo og Brandur Jacobsen

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

fundurin lokin kl. 22.00

Jóhan Christiansen

Hanna Jensen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen